

## Íslendska stjórnin fer at leita efti fjaldum pengum

Hildið verður, at íslendsk feløg hava milliardir standandi í bankum í londum, sum vanliga verða brúkt sum skattaskjól Íslendsku myndugleikarnir fara nú at leita eftir pengum, sum íslendsk feløg hava standandi í støðum, sum van-liga verða umrødd sum skattaskjól. Tað kunnaði fíggjar-málaráðharrin, Steingrímur J. Sigfússon, hinar ráðharr-arnar um í gjár. Morgunblaðið visti í gjár at siga, at stjórnin fer at skipa so fyri, at skattavaldið fær betri møguleikar at finna fram til tað, sum blaðið kallar fjaldar pengar. Mill-um skattaskjólini, sum íslendingar hava brúkt, eru oyggin Tortola, sum er partur av British Virgin Islands, oyggin Guernsey í Ermasundi, Kýpros og Cayman-oyggj-arnar. Tað er komið fram í seinastuni, at innistandandi hjá íslendskum feløgum í hesum londum fleirfaldaðist í árunum frá 2002 til 2007. Upplýst er, at í 2002 áttu íslendsk feløg 945 milliónir íslendskar krónur í teimum nevndu londunum, men at hetta tal kom heilt upp í 43,7 milliardir íslendskar krónur í 2007. Tey seinastu árini hava fleiri lond lagt seg eftir at finna pengar, sum feløg og einstaklingar fjala í teimum sokallaðu skattaskjólunum. Bretska skattavaldið hevur verið á leitingarferð, men tað mest umrødda átakið av hesum slagnum er amerikanska royndin at fáa upplýsingar úr Sveis. Amerikanarar vilja vera við, at 52.000 amerikonsk feløg og einstaklingar hava fjalt einar 20 milliardir dollarar í Sveis.

# Stovna nú partafelag at gera undirsjóvartunnilin í Sandoy

**Landsstýrið fer nú at stovna partafelag, sum skal yvirtaka ætlanina at gera undirsjóvartunnilin í Sandoy. Samstundis verður lógin avtikin, sum sigur, at farast skal undir tunnilin 1. november í ár**

SANDOYARTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal eitt partafelag stovnast at standa fyri arbeiðnum at gera undirsjóvartunnil ímillum Streymoy og Sandoy.

Í morgin verður ein rúgva av uppskotum løgd fyri løgtingið, tí hetta er síðsta freist at leggja uppskot fram, sum skulu avgreiðast í hesi tingsetuni, sum endar á ólavsøku.

Og Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, váttar fyri Sosialinum, at eitt av uppskotunum, sum hon leggur fyri Løgtingið í morgin, er eitt uppskot um at stovna partafelag at gera fast samband um Skopunarfjørð.

Uppskotið kallast: Uppskot til løgtingslóg um at gera partafelag at gera fast samband um Skopunarfjørð.

### Ein millión

Landstýriskvinnan sigur, at partafelagið verður stovnað eftir sama leisti, sum felagið, ið stendur fyri Norðoyatunlinum.

Tað merkir, at talan verður um eitt alment partafelag, har landskassin eigur allan partapeningin og peningurin í felagnum verður útvegaður á fíggjarlógini.

Á fíggjarlógini í ár eru tvær milliónir settar av til Sandoyartunnilin.

Annika Olsen sigur, at ein millión av teimum verður brúkt til at stovna P/F Sandoyartunnilin og hendan milliónin verður so partapeningur í felagnum.

Tann eina milliónin, sum so er eftir, verður brúkt til at halda fram við forkanningunum.

Landsstýriskvinnan sigur, at endamálið er so, at tað verður partafelagið, sum hereftir skal standa fyri arbeiðnum at fyrireika og gera tunnilin.

Sostatt skal partafelagið eisini yvirtaka alt tilfarið, sum Landsverk hevur um tunnilin frá teimum forkanningum og útrokningum, sum eru gjørdar.

Hon leggur afturat, at tað framvegis er neyðugt at útvega tríggjar milliónir til forkanningarnar, áðrenn tað verður klárt at fara undir arbeiðið.

Hesi seinastu árini hevur landskassin goldið góðar 40 milliónir um árið í Norðoyatunnilin. Tað síðsta gjaldið fellur til gjaldingar í ár og tað, sum hevur ligið í teimum politisku kortunum, er, at síðani skal gjaldið upp á tær góðu 40 milliónirnar, flytast yvir í Sandoyartunnilin.

Men verða bara 40 milliónir settar av til tunnilin um árið, ganga nógv ár, áðrenn farast kann undir tunnilin. Hvussu er annars ætlanin at fíggja hann og er ætlanin at seta størri upphæddir av á fíggjarlógini?

- Tað er alt saman ein spurningur um tann politiska viljan og um, nær vit semjast um, at farast skal undir tunnilin, sigur Annika Olsen.

Annars skal samgongan taka spurningin um allar almennar íløgur upp til viðgerð við tí endamáli at semjast um eina raðfesting fyri, hvar og nær tær ymsu íløgurnar skulu gerast tey næstu árini

Annika Olsen sigur, at tað einasta, hon fyribils hevur at halda seg til, eru ásetingarnar í samgonguskjalinum, har tað stendur, at farast skal undir Sandoyartunnilin í 2011.

Men semist samgongan um okkurt annað, halda vit okkum sjálvandi til tað, leggur hon afturat.

### Sandoyartunnilin útsettur

Annars hevur Løgtingið longu samtykt eina lóg, sum sigur, at farast skal undir at bora Sandoyartunnilin longu í november í ár og tann lógin er framvegis í gildi.

Men tað er longu nú greitt, at tann ætlanin fer ikki at halda.

Annika Olsen sigur, at samstundis, sum partafelagið Sandoyartunnilin verður stovnað, verður lógin avtikin sum sigur, at farast skal undir sjálva boringina í november í ár.

Men sum tað framgongur á niðaru greinini her á síðuni, er tað eisini ein spurningur um málsetningurin heldur sum sigur, at farast skal undir Sandoyartunnilin í 2011.



*Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, fer nú at stovna eitt partafelag, sum skal standa fyri arbeiðnum at fyrireika og gera undirsjóvartunnilin í Sandoy. Men nær arbeiðið kann byrja, veldst altíð um støðuna í samfelagnum og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ávarar ímóti at seta ov dýr projekt í gongd í hesum døgum*

# Óvissa um Sandoyartunnilin

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur at vit mugu vera varin við at fara undir dýrar verkætlanir og landsstýriskvinnan í innlendismálum sigur, at Sandoyartunnilin verður altíð treytaður av fíggjarstøðuni í samfelagnum**

ALMENNAR ÍLØGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Spurningurin um, nær farast kann undir Sandoyartunnilin, veldst altíð um støðuna í samfelagnum.

Tað staðfestir Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum.

Í samgonguskjalinum stendur, at farast skal undir Sandoyartunnilin í 2011.

Men tað er skilligt á politiska kjakinum seinastu dagarnar, at hetta skal takast við fyrivarni.

Í Løgtinginum mikudagin ávaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum ímóti at Løgtingið samtykkir íløgur, sum fara at føra ovurstórar útreiðslur við sær tey næstu árini.

- Tað er ongin, sum kann spáa um tey næstu árini og tí skulu vit vera varin við at seta ov nógvar dýrar ætlanir í verk í hesum døgum, segði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Bæði hann og aðrir tingmenn vísti á týdningin av, at íløgurnar skapa so nógv arbeiði, sum tilber.

Í hesum sambandi staðfesti John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum, at tær íløgur, sum skapa minst virksemi, eru íløgur í tunlar og vegir.

- Og tað er ikki rætt at sorla almenna forsorg sundur, bara fyri at sleppa at gera fleiri tunlar, staðfesti hann og sipaði til sparingarnar á almannaøkinum, sum hava havt ringar avleiðingar.

Jóannes Eidesgaard legði dent á, at politiska skipanin kann ikki standa modell til, at “vit fýra hundraðtals milliónir av” til tunlar, vegir og havnir, samstundis sum grundraksturin í samfelagnum til eldrarøkt og onnur almannamál er spardur niður um tað, sum er virðiligt. Grundraksturin má vera á einum sømiligum støði, áðrenn vit hugsa um íløgur, staðfesti hann.

### Fíggjarstøðan avgerandi

Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, staðfestir eisini, at tað verður altíð fíggjarliga gongdin í samfelagnum, sum vera avgerandi fyri, nær farast kann undir Sandoyartunnilin.

- Tað er ongin ivi um, at vit fara ikki undir nakað í óðum verkum. Ongin veit, hvussu tær næstu árini verða og tað verður altíð fíggjarstøðan í samfelagnum, sum verður avgerandi fyri, hvørjar íløgur, farið verður undir.